STUTT SAGT

## 101 milliónir fyri kvoturnar

**Aker Stord fíggjaði 95 mió kr., tá P/F Sea Freeze keypti kvoturnar frá Sheanne, Bettina og June-D**

FISKIVINNA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í lógini um vinnuligan fiskiskap verður staðfest, at landsstýrið hevur heimild at biðja um útgreinan av fígging, um útlensk áhugamál eru í keypi av skipi við tilhoyrandi veiðirættindum.

Soleiðis var eisini, tá Sea Freeze keypti tríggjar ídnaðartrolarar.

Og svarið sýnir greitt, at tað er norska Aker Seafood, sum Kjeld-Inge Røkke, eigur, ið hevur fíggja gildið. Aker Seafood hevur í fyrsta lagi lænt 70 mió kr., sum síðani eru læntar PF/Sea Freeze. Hartil hevur Aker Seafoods Holding lænt Sea Freeze 25 mió kr., og at enda hevur P/F Næraberg, sum partvíst er ogn hjá Aker, lænt Sea Freeze 6 mió kr. Í alt 101 mió kr.

Landsstýrið kann hartil eisini biða um váttan fyri, hvussu ognarlutfallið og ræðisrættindini í ymsu feløgunum eru. Tí ber til at kontrollera, hvør á pappírinum hevur atkvøðurættin í feløgunum, men hinvegin fæst ikki at vita, hvørt serlig viðurskifti eru í partaeigaraavtalum. Viðurskifti, sum kunnu nýta at tryggja peningaligu áhugamálini hjá minnilutaeigarum.

# Skuldu bara hava kvotuna

**Tá P/F Sea Freeze keypti Sheanne, Bettina og June-D, ætlaði dóttirfelagið hjá Næraberg at lata seljara skipini aftur alt fyri eitt – men uttan fiskiloyvi. Skipini vórðu seld Sea Freeze ávíkavist 19. og 27. apríl, og fáar dagar seinni vórðu loyvinin tilskeytað P/F Sea Freeze**

FISKIVINNA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Saman við Bettina og June-D varð Sheanne selt P/F Sea Freeze, sum Næraberg eigur. Samlaði prísurin var 101 mió kr., men skipini ætlaðu keypararnir ongan tíð at eiga*

»Tíðin er ikki heilt búgvin enn at yvirtaka sjálvt skipið. Men fyri fyrst er ætlanin at yvirtaka loyvini. Hetta verður ætlandi gjørt á tann hátt, at skipið beinan vegin nú verður tilskeytað keyparunum, sum so av Fiskimálaráðn um fær útskrivað neyðugu rættindini tilhoyrandi skipunum. Síðani verður skipið afturskeytað seljara við ræðisavmarking, og keyparin hevur framvegis tilsøgn um veiðirættindini«

Soleiðis er orðaljóðið í skrivi, sum sakførarin hjá P/F Sea Freeze, sum er dótturfelag hjá P/F Næraberg, sendi Fiskimálaráðnum tann 18. apríl í ár.

Í sama brævið verður sagt, at tað heldur ikki er heilt víst, at skipini verða verandi hjá Sea Freeze. »Tað kann eisini koma hartil, at keyparin ikki endaliga keypir skipið, og tí má keyparin hava vissu fyri, at hann fær áðurnevndu tilsøgn frá Fiskimálaráðnum, um framman fyri nevnda mannagongd verður framd.«.

Handilin vil Sheanne varð gjøgnumførdur tann 18. apríl, og tríggjar dagar seinni fekk felagið váttan fyri, at veiðiloyvið nú var flutt partafelagnum – heldur enn skipinum.

Fáar dagar seinni verða Bettina og June-D eisini seld P/F Sea Freeze, og 1. mai verður biðið um, at veiðiloyvini hjá hesum verða flutt felagnum á sama hátt, sum tað varð gjørt við Sheanne.

# Hava onga vissu

**Sambært brævaskiftinum millum Fiskimálaráðið og advokatin hjá Sea Freeze, hevur felagið onga vissu fyri, at keyptu kvoturnar ikki broytast í framtíðini**

FISKIVINNA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá P/F Sea Freeze keypti tey trý ídnaðarskipini, Sheanne, Bettina og June-D, fylgdu 4/7 partar av felagskvotuni hjá ídnaðarskipum við í handlinum.

Í skrivi til Fiskimálaráðið verður staðfest, at felagið vil hava vissu fyri, at loyvini verða verandi ogn hjá P/F Sea Freeze, og felagið ikki kann gera nakra stóra íløgu í skip, so leingi sum vissa ikki er fingin fyri, hvørji rættindi verða tillutað.

Í svarskrivi sínum skrivar Fiskimálaráðið, at tey illa fáa veit nakra vissu fyri hesum.

»Mett hevur verið, at felagskvota tænti best endamálinum at fiskirættindi hjá ídnaðarskipunumv verða fult gagnnýtt. Tað eru ongar ítøkiligar ætlanir um at víkja frá hesi mannagongd.

»Tað skal tó verða lagt afturat, at um farið verður frá felagskvotum til at luta fiskirættindi hjá ídnaðarskipum sum egnar kvotur grundað á aðalregluna um at býta javnt millum skipini, er sannlíkt, at tey trý navngivnu skipini fara at fáa 4/7 av felagskvotunum hjá ídnaðarskipunum, um talið av ídnaðarskipum er óbroytt.

Hetta avarkar tó ikki møguleikan hjá Fiskimálaráðnum seinni at lata onkrum skipi afturat burtur av fiskirættindunum hjá ídnaðarskipum, sum síðani kann ávirka oman fyri nevnda brøk«

Hvørt hetta verður roknað sum nakað garanti hjá keyparа, er ilt at siga. Men undir øllum umstøðum varð handilin gjøgnumførdur fyri ikki minni enn 101 mió kr.

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við